| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 27. mars 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 05/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2014 tann 27. mars kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. mars 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari

**Mál nr. 11/2014.**

***Viðvíkjandi kappróðrarneystinum á matr. nr. 239af í Fuglafirði.***

Tekniska nevndin hevur á fundi tann 18. februar 2014 í sambandi við byggimáli hjá Føroya keypsamtøku á matr. nr. 239af og 239a viðgjørt fyrispurning frá ÍF kappróðri, um at felagið kann fáa umleið 57 fermetrar av kjallaranum til teirra virksemi.

Talan er um øki sunnan fyri kappróðrarneystið móti bygninginum hjá P/F Petur Larsen á matr. nr. 239aa.

Hetta treytar, at nevndu 57 fermetrarnir verða fluttir úr matr. nr. 239a yvir í matr. nr. 239af, soleiðis at víddin verður broytt úr 291 fermetrum upp í 348 fremetrar.

Mett verður, at kostnaðurin fyri arbeiðið, tó ikki innrættingina, sum felagið sjálvt skal taka sær av, er umleið kr. 400.000,00.

Tekniska nevndin heitti á fundinum á fíggjarnevndina um at viðgera meirkostnaðin av hølunum hjá ÍF kappróðri.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. mars 2014 og mælir nevndin býráðnum til, at kommunan kemur at rinda kostnaðin fyri arbeiðið, so umstøðurnar hjá ÍF kappróðri kunnu gerast uppaftur betur enn tær eru ídag.

Nevndin mælir býráðnum til, at upphæddin fyri arbeiðið kr. 400.000,00 verður fíggjað av íløgu í vegir, rakstrarstaði 06.38.11.531.10 konto 310001, har avsettar eru tilsamans kr. 9.020.000,00 fyri fíggjarárið 2014.

Sambært fyriliggjandi játtan eru kr. 3,6 mió. avsettar til vegin Gjógvará/havnarlagið, meðan kr. 1,4 mió. eru avsettar til økið niðanfyri Bókasavnið.

Nevdin metir, at tað í løtuni er óneyðugt við at heita á býráðið um eykajáttan, men um so verður, at játtanin til vegin ikki kemur at halda, so vil nevndin viðgerða spurningin til ta tíð.

***Avgerð:***

Tilmælið frá teknisku- og fíggjarnevndini varð einmælt samtykt soleiðis, at ÍF Kappróður fær 57 m2 av kjallarahæddini hjá Føroya Keypssamtøku. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17,00

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Maris Sólheim Thomsen